Kristina Háfoss
løgtingsmaður

Nr. 76/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um at lata samfelagið upp á tryggum grundarlagi, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hví hava hava føroyskir myndugleikar ikki sett sum mál at fáa so nógv fólk í Føroyum sum møguligt kannað fyri COVID-19 koronavirus?
2. Tá vit kunnu kanna 600 um dagin - og um vit gagnnýttu okkara kanningarútgerð í Føroyum til fulnar - hvussu skjótt høvdu vit kunnað kannað øll fólk í Føroyum?
3. Heldur landsstýrismaðurin, at tað hevði styrkt møguleikan at tálma COVID-19 koronavirusinum, um allir føroyingar fingu bjóðað at verða kannað fyri COVID-19? Um ja, hví verður hetta ikki framt?
4. Metir landsstýrismaðurin, at tað hevði styrkt møguleikan fyri gransking og nýggjari vitan í Føroyum um COVID-19 koronavirusið, um vit fingu kannað so stóran part av fólkinum í Føroyum sum møguligt? Um ja, hví verður hetta ikki framt?
5. Ætlar landsstýrið at tryggja við lóg, at øll, ið koma til Føroyar úr útlondum, skulu í 14 dagar sóttarhald, og/ella at tey skulu COVID-19 kannast, t.d. tá tey koma til landið, eftir 1 viku og eftir 2 vikur? Um ikki, hví?
6. Um vit hava møguleikan at fremja fleiri kanningar og ikki brúka hesar umstøður, ætlar landsstýrismaðurin at bjóða øðrum grannatjóðum at senda kanningar til Føroya at verða greinaðar?

Viðmerkingar:
Føroyar hava verið fremsta land í heiminum, tá umræður kanningar av COVID-19 koronavirusi fyri hvønn íbúgva. Um 12% av fólkinum í Føroyum eru kannað. Men nú eru lutfalsliga fleiri kannað í Íslandi. Eisini hava fleiri onnur lond sett sær fyri at bjóða alsamt fleiri at verða kannað, tí tey hava staðfest, at hetta er besti mátin at tálma spjaðingini av virusinum og at venda aftur til ein meira vanligan gerandisdag sum skjótast.
Í Føroyum hava vit umstøður at kanna umleið 600 fólk dagliga. Hetta merkir, at vit kunnu kanna øll fólk í Føroyum eftir lutfalsliga stuttari tíð, um vit ynskja hetta. Um vit gagnnýttu hetta, hevði tað givið føroysku heilsumyndugleikunum eitt óvanliga gott innlit í, hvør smittustøðan er í Føroyum, og hevði gjørt tað møguligt at staðfest, um tað eru fólk í Føroyum, ið eru smittað. Hetta átti at gjørt tað lættari at "latið samfelagið upp" á tryggan hátt.
Seinastu vikurnar eru alsamt færri fólk, ið hava latið seg kannað. Orsøkin er helst, at fráboðað er, at tú skalt hava eyðkenni fyri at venda tær til lækna. Samstundis staðfestir vitan í og uttanfyri Føroyar, at nógv eru smittað, uttan at hava eyðkenni. Tað eru uttan iva eisini nógv, ið fegin høvdu ynskt at fingið kanning framda, um tað var møguligt, uttan at eyðkenni vóru til staðar.
Samstundis sum stórar avmarkingar eru í gerandisdegnum hjá føroyingum, so koma nógv fólk til Føroya úr útlandinum vikuliga. Heitt verður á hesi um at fara í sóttarhald, men enn er onki lógarkrav. Ein máti at tálma hesum smittuvanda er at krevja kanningar av fólkum, ið koma til

Føroya – bæði tá tey koma, og t.d. eftir 1 og 2 vikur. Samstundis sum tey verða kravd at fara í sóttarhald. Hetta hevði verið ein máti at tálma smittuvandanum. Og um vit ikki nýta alla okkara kanningarútgerð, kundu vit hartil bjóðað okkum fram at hjálpt grannatjóðum okkara at gjørt kanningar fyri tey.
Fyri at fáa lýst støðuna viðvíkjandi COVID-19 kanningum í Føroyum – og fyri at fáa tikið stig til, at Føroyar verða undangonguland, tá umræður COVID-19 koronaviruskanningar í heiminum - verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum í heilsumálum.

Á Løgtingi, 27. apríl 2020

Kristina Háfoss